# Skiftu vert á markinum

Eftir gomlum íslendskum siðið fekk íslendski forsetin nýggjan vert, tá hann kom á kommunumarkið millum Runavíkar Kommunu og Gøtu Kommunu

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*
*Jens Kristian Vang (myndir)*

**Gøta:**
Tá vitjan Ólaf Ragnar Grímsson í Runavík var av fyrrapartin í gjár, fylgdi Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, honum til kommunumarkið á Gøtueiði, har borgarstjórin í Gøtu, Halldóra Ranghamar, tók við og fylgdi forsetanum víðari í bussinum til Norðagøtu.

Í Norðagøtu varð vitjað í gomlu kirkjuni og gingið í sporum Gøtu Tróndar, og síðani varð farið í nýggju kirkjuna við Gøtugjógv, har Atli Hansen, kirkjuráðsformaður, greiddi frá kirkjuni og sangkórið Gøta-Leirvík sang gamla Kingo lagið »Nú rennur sólin frí« og íslendska sangin »Smávinir Fagrir«.



*Ólafur Ragnar Grímsson takkar Rodmundi Nielsen, borgarstjóra í Runavík, sum var vertur fyri ferðalagnum. Á kommunumarkinum til Gøtu tók Halldóra Ranghamar, sum er bygdarráðsformaður í Gøtu, yvir sum vertur*

# Kunnaðu forsetan um oljuvinnu

Íslendski forsetin varð kunnaður um oljuvinnu og um leiklutin hjá Atlantic Supply Base í henni, tá hann fyrrapartin fríggjadagin vitjaði í Runavík

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*
*Jens Kristian Vang (myndir)*

Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, varð væl kunnaður um eina komandi oljuvinnu í Føroyum, tá hann vitjaði í Runavík fríggjadagin.

Lasse Borðoy, stjóri fyri útgerðarhavnina í Runavík, kunnaði forsetan um væntandi virksemið og um leiklutin hjá Atlantic Supply Base í Runavík í eini komandi oljuvinnu.

## Stór móttøka

Stór móttøka var á bryggjuni í Runavík, tá Brimil um tíggju tíðina fríggjamorgunin legði at við íslendska forsetanum, Ólafi Ragnar Grímsson, umborð.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, tók ímóti forsetanum og dótti borgarstjóran, Mia Nielsen, handaði forsetafrúuni, Dorrit Moussaieff, blómutyssi.

Íslendski forsetin gav sær góðar stundir at heilsa upp á mongu fólkini á bryggjuni, áðrenn hann við fylgi fór í bussin, sum koyrdi hann niðan á kommunuskrivstovuna, har hann skuldi fáa eitt sindur at vita um føroyskt oljuvirksemi.

Uttan fyri kommunuskrivstovuna var somuleiðis stór mannfjøld og fagna forsetanum.

## Fekk horn til gávus

Á samkomuni í kommunuskrivstovuni í Runavík fekk íslendski forsetin eitt snapsaglas gjørt úr horni til gávus frá kommununi, og forsetafrúan fekk silvursmúkkur til føroyska búnan.

Íslendsku blaðmenninir, sum eru við á ferðini í Føroyum, vænta ikki, at íslendski forsetin fer at drekka nógvar snapsir úr føroyska veðrahorninum, tí hann drekkur ikki.



*Íslendski forsetin fekk handað snapsaglas úr føroyskum horni frá Runavíkar Kommunu*